## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði og okkurt kavæælið, men um kvøldið minni vindur av útnyrðingi og yvirhøvur turt. Hitalagið millum ÷1 og+2 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi, um kvøldið upp í stívt andøvsgul . Sólglottar, men eisini kavaælingur og hitalagið millum ÷1 og +2 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum frostmarkið og +3 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi og vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 1 og 5 stig.

# Brúktbilaútsøla

Seinastu vikuna hevur Reyni Service havt lýsingar, har boðað hevur verið frá brúktbilasølu, nú felagið hevur ognað sær økið við Oyggjarvegin.

Hósdagin byrjaði so tiltakið, og tað var ikki frítt, at nógv fólk sýndu mongu bilunum áhuga.

Tá vit høvdu orðið á Eivind á Reyni, stjóra, vóra bara trý korter liðin, síðani sølan byrjaði, og longu tá vóru fýra bilar seldir.

- Nøkur eru eisini úti og royndarkoyra onkran bil, sum tey kanska ætla sær, so alt í alt kunnu vit ikki klaga, heldur stjórin fyri.

Seinastu tíðina hevur nakað av tosi verið um fallandi bilmarknaðin, sum ikki minst sæst aftur í eini minkandi brúktbilasølu. Í nøkrum førum hevur hetta eisini viðført, at bilasølur ikki so fegnar hava tikið brúktar bilar inn, tí vandi er fyri at »brenna« inni við hesum.

Men hetta er sambært stjóranum so ikki orsøkin til, at tey hava valt at hava hesa útsøluna.

- Vit vilja fyrst og fremst markera, at vit nú eisini hava hetta økið at ráða yvir. Við einum stórum campingvogni sum skrivstovu, kunnu vit eisini avgreiða kundarnar fult og heilt her niðri, og tað hevur í øllum førum víst seg at rigga væl.

- Viðvíkjandi brúktum bilum, so haldi eg ikki, at vit í dag hava nógv fleiri bilar inni, enn vit vanliga hava, so tað er ikki orsakað av ótta, at vit selja nakrar bilar bíliga, staðfestur hann.

Enn hava tey á Reyni Service tó ikki gjørt av, hvørt nýggja økið eisini framhaldandi skal nýtast til brúktbilasølu.

- Nú hava vit so hetta tiltakið fyri fyrst.Tað stendur so við til annan leygardag. So mugu vit síggja, hvussu tað fer at roynast, sigur Eivind á Reyni at enda.



*Stórur áhugi var fyri brúktbilaútsøluni hjá Reyni Service, sum lat upp hósdagin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -17 |
| Nuuk | -11 |
| Qaqortoq | -10 |
| Ammassalik | -1 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -3 |
| Seyðisfjørður | -1 |
| Tórshavn | 1 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 8 |
| Tromsø | 2 |
| Bergen | 0 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 1 |
| Keypmannah. | 2 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | -4 |
| Berlin | 2 |
| Warzawa | -2 |
| Kiev | -1 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 7 |
| Madrid | 11 |
| Róm | 8 |
| Malorca | 13 |
| Athen | 11 |
| Malta | 8 |
| Tunis | 8 |
| Beijing | 2 |
| New Dehli | 17 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | -- |
| New York | -5 |
| Miami | 17 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 31 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 31 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 964 hPa. við Bergen fer í landsynning eystan. Eitt annað lágtrýst, 972 hPa. í landnyrðing úr Íslandi fer í landsynning.




**Í dag:**
Hátrýstið sunnan fyri Hvarvið fer eystureftir og mennist. Tað gevur væntandi góðveður á okkara leiðum um vikuskiftið.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 19/1 kl. 06[00]–20/1. 06[00]. Hitin í gjár: 2,6°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° - Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 11,0 mm – mált frá 19/1 kl. 06[00]–20/1 kl. 06[00]
Avfallið higartil í januar: 174,8 mm

### ÚF Morgunlestrar
**24.– 29. januar**

***Selmar Jacobsen, í Havn lesur***

**Sálmar:**

**Mánadagin 24. januar:**
nr. 69 Jesus, kom og ver hjá mær
nr. 70 Jesus, kom og hjá mær ver

**Týsdagin 25. januar:**
nr. 305 Leið meg, Guð, á lívsins leið
nr. 2 Lovsyng tínum Harra

**Mikudagin 26. januar:**
nr. 417 Eg haldi saman hendur, Guð
nr. 4 Heilagt ljóð oss legg á tungu

**Hósdagin 27. januar:**
nr. 419 Góði Harri, hoyr, eg biði
nr. 422 Harri, tú vár verndari og skjøldur-

**Fríggjadagin 28. januar:**
nr. 54 Tú fylgdi mær fyrst

**Leygardagin 29. januar:**
nr. 421 Harri, mínar troyttu hendur
nr. 718 Jesus er tann besti vinur

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## VESTFALLSKYRRINDI

18. januar — Tendring/Mánin næstur jørðini
19. januar — Fyrra kvarter
20. januar — Mánin longst frá jørðini
21. januar — Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 21. Jan | 03.41 | 16.05 | 02.41 | 15.05 | 02.56 | 15.20 | 05.41 | 18.05 | 06.41 | 19.05 | 01.56 | 14.20 | 00.56 | 13.20 | 03.56 | 16.20 | 04.56 | 17.20 | 03.26 | 15.50 | 04.41 | 17.05 |
| 22. Jan | 04.29 | 16.54 | 03.29 | 15.54 | 03.44 | 16.09 | 06.29 | 18.54 | 07.29 | 19.54 | 02.44 | 15.09 | 01.44 | 14.09 | 04.44 | 17.09 | 05.44 | 18.09 | 04.14 | 16.39 | 05.29 | 17.54 |
| 23. Jan | 05.19 | 17.43 | 04.19 | 16.43 | 04.34 | 16.58 | 07.19 | 19.43 | 08.19 | 20.43 | 03.34 | 15.58 | 02.34 | 14.58 | 05.34 | 17.58 | 06.34 | 18.58 | 05.04 | 17.28 | 06.19 | 18.43 |
| 24. Jan | 06.07 | 18.26 | 05.07 | 17.26 | 05.22 | 17.41 | 08.07 | 20.26 | 09.07 | 21.26 | 04.22 | 16.41 | 03.22 | 15.41 | 06.22 | 18.41 | 07.22 | 19.41 | 05.52 | 18.11 | 07.07 | 19.26 |
| 25. Jan | 06.45 | 19.05 | 05.45 | 18.05 | 06.00 | 18.20 | 08.45 | 21.05 | 09.45 | 22.05 | 05.00 | 17.20 | 04.00 | 16.20 | 07.00 | 19.20 | 08.00 | 20.20 | 06.30 | 18.50 | 07.45 | 20.05 |

5 707265 100050 >